# Strategi sum undirvísingartilfar

Strategiin, sum leiðslan á Smyril Line legði saman við dananum Lars Bo Hansen, verður nýtt av dananum í hansana fyrilestrum á Copenhagen Business School




STRATEGI

*Peter Holm hevur saman við leiðsluni megnað at vent gongdini í Smyril Line, so felagið nú kastar væl av peningi av sær*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leo Poulsen

– Tá vit á vári 2009 stungu út í kortið hvørja leið vit skuldu taka fyri at venda gongdini í Smyril Line, so var tað hitt einfalda, vit konsentreraðu okkum um.

Tað sigur Peter Holm, stjóri á Smyril Line.

Felagið er farið frá akkurát at hóra undan, til at vera ein sunn og gevandi fyritøka.

– Orkan er avmarkað, og tí hava vit valt at fokusera upp á nakrar fáar marknaðir. Fyrst og fremst føroyska, danska, týska og hollendska marknaðin, og so hava vit nakrar fáar aðrar marknaðir, har vit ikki leggja serliga orku í, sigur Peter Holm.

Sama er galdandi við teimum produktum, sum felagið bjóðar. Eisini har verður fokuserað á nøkur einvís øki.

Danin, Lars Bo Hansen, er kendur innan shippingøkið, og heldur javnan fyrilestrar á Copenhagen Business School, har strategiin hjá Smyril Line og gongdin í felagnum er fastur táttur í fyrilestrunum. Hann fylgir væl við gongdini í felagnum.

### Øskan dýr

Tað er ikki bara flogferðslan, sum hevur mist nógvan pening orsakað av øskuni frá Eyjafjallajøkli í Íslandi.

– Vit hava ræ̈ttiliga merkt árinini av øskuni. Vit hava fingið nógvar avlýsingar frá ferðafólki, sum aftra seg við at fara til Íslands, og serliga eru tað ferðir, sum fólk kortini ikki keypa og heldur útseta til næsta ár. Vit tosa um mistan vinning í milliónaflokkinum, sigur Peter Holm.

Hinvegin flutti Norröna nógv fólk millum Føroyar og Danmark, meðan flúgvingin var mest tarnað av øsku.

- Í mun til vanligar túrar millum Føroya og Danmark, har eini 200-300 fólk eru við, høvdu vit upp í 1100 fólk umborð. Men hetta er bíliga vertíðin, so tað merktist ikki so væl, sum tað kundi, sigur Peter Holm.

leo@sosialurin.fo

# Sýslumaður brotið revsilógina

**Sýslumaðurin í Eysturoynni, Ingibjørn Eldevig, var seinnapartin í dag funnin sekur í at hava brotið §155 og §265 í revsilógini. Dómurin var 10 dagbøtur á 450 krónur umframt at hann skal gjalda sakarkostnaðin.**

Leo Poulsen

Málið snýr seg um, at Ingibjørn tann 13. februar 2008 uttan fyri embætistænastu hevði leita eftir upplýsingum á CPR-dátugrunninum hjá løgregluni. Upplýsingarnar skuldi hann nýta at tryggja sær, at hann hevði rætt telefonnummar hjá føroyskari kvinnu, búsitandi í Danmark.

Hendan kvinnan eigur eina dóttir saman við føroyingi, sum Ingibjørn Eldevig bæði sum bygdarmaður og gjøgnum arbeiði sítt sum løgreglumaður kendi. Kvinnan hevði fingið polititilhald sett fram móti manninum í 1999 og tað varð longt aftur í fimm ár aftrat í 2004.

Viðkomandi heitti á Ingibjørn Eldevig um at kanna eftir, um kvinnan hevði vilja latið honum eina mynd av dóttrini, og tað var hetta, sum núverandi sýslumaðurin gjørdi um kvøldið tann 13. februar 2008.

Eftir at hann var komin á vakt á løgreglustøðini í Runavík hetta kvøldið, leitaði hann fyrst inni á datagrunninum yvir CPR-nummur hjá løgregluni, og síðani ringdi hann av løgreglustøðini til kvinnuna, hóast hann visti, at maðurin, hann ringdi fyri, ikki á nakran hátt mátti seta seg í sambani við kvinnuna.

Ingibjørn Eldevig játtaði seg sekan í at hava leita inni á datagrunninum hjá løgregluni utta fyri embætistænastu, men noktaði seg sekan í at hana sett seg í samband við kvinnuna mansins vegna. Tað gjørdi hann egna vegna, greiddi hann frá í ræ̈ttinum fríggjadagin.

Dómarin metti tað tó vera prógvað, at sýslumaðurin hevði ringt til kvinnuna aðra manna vegna, og Ingibjørn Eldevig varð tí dømdur eftir ákæruskrivinum, og fekk 10 ferðir 450 krónur í dagbøtum, umframt at gjalda sakarmálskostnaðin.

Verjin bað um umhugsingartíð at kæra dómin. Sjálvur hevði Ingibjørn onga viðmerking tikl málið eftir dómin.